# Dráp og frásagnir um dráp í Føroyum

*Eftir Høgna Debes Joensen og J. P. Hart Hansen.*

Í nýggjari føroyskari søgu koma dráp ógvuliga sjáldan fyri. Fyri fáum árum síðan varð vanliga sagt, at eingin var dripin í Føroyum seinastu tvey hundrað árini. Við at hyggja at hagtølum yvir deyð í Føroyum, sum eru at finna frá 1877, finnast dráp sum deyðaatvold bert í árunum 1967 og 1970 (*Medicinalberetningen* 1877—1970).

Eftir Svabo at døma hava føroyingar heldur ikki verið drápshugaðir í gomlum døgum. Hann sigur millum annað, »Mord have til lykke altid været særdeles sjeldne, og uhørte i de sildigere tider« (*Svabo* 1959). *Andersen* (1895) skrivar, at í Føroyum finnast ikki nógv brotsverk »mod liv og lemmer; færingerne vare, som de sagde om sig selv, et blødt folk, der ikke var vant til at se fjenden under øjne«. Dráp í eldri døgum tykjast tó ikki at hava verið so sjáldsom, um lítast kann á sagnirnar, Føroyingasøgu og tilíkar keldur.

Av tí at drápstíttleikin í Føroyum seinastu nógvu árini tykist at vera so lítil, eisini samanborin við onnur samfeløg í nánd av okkum, eitt nú í Íslandi, Grønlandi og Danmark, skal her verða roynt at geva eitt savnað yvirlit yvir dráp í Føroyum frá landnámstíðini til okkara dagar.

### *Um tilfarið.*

Nøgdin av hesi grein viðger tilburðir úr søgu og søgnum, og er tilfarið tí í sjálvum sær so óvist, tá ið skiljast skal millum søgu og veruleika, at tað hevði verið skeivt heilt uttan fyrivarni at farið undir eina nágreiniligari kanning á hesum

grundarlagi. Keldutilfarið er fyrst og fremst Føroyingasøga (1962), Færøske Folkesagn (*Jakobsen* 1961), Færøsk Anthologi (*Hammershaimb* 1891), Færøerne 1600—1709 (*Andersen* 1895) og tíðarritið *Varðin*. Atgongd hevur verið til sakarmálsskjøl um dráp á okkara døgum.

Tey einstøku sakarmálini er ein komin fram á við miðvísari gjøgnumgongd av keldutilfarinum. Hóast til dømis Føroyingasøga ikki kann metast at vera beinleiðis søguskriving, kann kortini verða loyvt at rokna við, at fleiri av teimum týdningarmiklu hendingunum í henni bera nakað av sannleika í sær, kanska serliga frásagnirnar um dráp av kendum monnum. Tað er eyðsæð, at øll tey mongu dráp, ið framd eru uttan hjáveru av vitnum, mugu sigast at vera meira og minni ivasom. Væl er hugsandi, at fólk í frásøgnum so við og við hava broytt hendingar, sum í veruleikanum vóru vanlukkur — til dømis endurgivnu hendingarnar um Guttorm í Gerðum — til drápstilburðir, kanska av teirri orsøk, at maðurin, sum skuldsettur varð fyri dráp manna millum, frammanundan var illa umtóktur av vanligum fólki.

At til eru sagnir, ið helst eru ósannar, sæst til dømis av viðmerkingum *Jakobsens* til søgnina um Anniku, FFÆ 485. bls., og um slagið í Mannafellsdali, har sagt verður frá um drápið á biskupin Mús, F.A. 381. bls. og FFÆ XXV—XXVI bls.

Lat at enda verða nevnt, at dømi tó eisini eru um, at ein við bert at lesa sagnirnar fær ta áskoðan, at framd eru færri dráp enn í veruleikanum. So er við drápunum, sum í 1629 vóru framd av turkiskum sjórænarum í Suðuroy. Sambært álítandi keldu (*Andersen* 1895, 236. bls.) vóru seks føroyingar dripnir, meðan bert tvey av drápunum verða umrødd í søgnini. Sama er at siga um søgnina um Óla Jarnheys, FFÆ 97.—103. bls. Sambært hesa útinnir Óli bert eitt dráp, meðan tað eftir viðmerkingum *Jakobsens*, FFÆ 490. bls., er mest líkt til, at Óli eisini hevur dripið eitt annað fólk. Hóast yvirlitið tí á ongan hátt kann sigast at geva eina heilt sanna mynd av drápshendingunum í Føroyum upp gjøgnum øldirnar, man tað kortini geva eina hylling av veruleikanum og sostatt hava ein vissan áhuga.

## *Keldutilfarið.*

*Andersen* (1895):

Bls. 208: Óli Murt gav konu síni so ringa viðferð, at hon doyði.

*Føroyingasøga* (1962):

Bls. 15: Havgrímur drepur Brestir við spjóti.
Bls. 15: Brestir drepur Havgrím við svørði.
Bls. 15: Beinir og fimm aðrir menn verða dripnir.
Bls. 40: Sigmundur drepur mann í Dímun við øks.
Bls. 41: Sigmundur drepur Øssur við øks.
Bls. 57: Sigmundur drepur ein mann
Bls. 57: Tórir drepur ein mann.
Bls. 57: Sigmundur drepur ein mann
Bls. 58: Sigmundur ger, at fimm av Tróndar monnum drukna.
Bls. 60: Sigmundur høggur við svørði til Steingrím og kleyv hann niður í herðarnar.
Bls. 62: Tórir og Einar druknaðu, eftir at Tróndur og menn hansara noyddu teir at leypa í havið.
Bls. 62: Torgrímur Illi og synir hansara høgga høvdið av Sigmundi við buløks.
Bls. 77: Karl Mørski verður dripin av Tórði Lága við stavøks.
Bls. 83: Tórhallur verður dripin, stungin í hjartað.
Bls. 83: Sjúrður drepur Bjarngrím við øks.
Bls. 83: Tórður Lági høgg til Havgrím við svørði, so hann fekk sín bana.
Bls. 83: Geyti Reyði høggur Hergrím við øks í høvdið og klývur tað niður í herðar.
Bls. 84: Torvaldur verður dripin.
Bls. 84: Geyti drepur ein fiskimann.
Bls. 85: Bjørn høggur Leiv við øks í høvdið, so hann doyr.
Bls. 85: Sjúrður Tollakson gevur Bjørn banahøgg.
Bls. 87: Sjúrður gevur manni banahøgg við at høgga beinini av honum oman knæ.
Bls. 87: Tórður drepur annan mannin og Geyti tann triðja.
Bls. 87: Sjúrður loypur inn í bátin og drepur ein av monnunum.
Bls. 93: Leivur stingur Sjúrð við spjóti, so hann doyr seinni.
Bls. 93: Heri Sigmundarson fær bana av Sjúrði við spjóti.
Bls. 93: Geyti verjir seg og drepur felaga Steingríms Sigmundarson.
Bls. 93: Leivur drepur Geyta.
Bls. 94: Tórður Lági verjir seg og drepur Brand Sigmundarson og tveir fylgisneytar hansara.
Bls. 93: Leivur drepur Tórð við svørði.

*Hammershaimb* (1852):

Bls. 337: Sørin bóndi møtir Símuni og drepur hann.

*Hammershaimb* (1891):

Bls. 355: Eirikur tekur øksina og høggur høvdið av bróður sínum.
Bls. 362: Hálvdan Úlvsson høggur høvdið av Árnafjarðarbóndanum.
Bls. 368: Flokksmenninir vórðu omanstoyttir av hægsta Valaknúki.
Bls. 371: Ormur bóndi drepur Oyrarbóndan við øks.
Bls. 371: Ormur drepur son Oyrarbóndans.
Bls. 373: Ormur bóndi verður dripin á tingstaðnum.
Bls. 375: Húsfrúgvin gróv tvær arbeiðskonur livandi í jørð.
Bls. 380: Í Mannafellsdali var stórt mannfall.
Bls. 380: Sunnanmenn vunnu sigur av hinum partinum og drópu nógv fólk.
Bls. 381: Bispurin Mús varð dripin av Akrabyrgisbóndanum.

*Hentze* (1926):

Bls. 203: Skrivarin reiggjaði fjallstavin yvir høvdið og rámti Jóannes á lendarnar. Hann andaðist átta dagar seinni.

*Færøske Folkesagn og Æventyr* (1961):

Bls. 12: Jógvan við Grind drepur son Giljabóndans í sjálvverju við knívi.
Bls. 15: Snopprikkur borar hol í bátin og klínir mold í holini. Báturin sakk og allir menninir doyðu.
Bls. 16: Snopprikkur tveitir uppgávukonuna fyri borð.
Bls. 24: Hargarbrøðurnir drepa írskar ránsmenn. Niklas drepur ein við at stinga hann við egnu korðu hansara.
Bls. 24: Ein annar hargarbróðir drepur ein íra.
Bls. 24: Hargarbróðirin Jógvan sló triðja íran til deyðis.
Bls. 27: Jansaguttarnir drepa fýra írskar ránsmenn. Ein varð dripin við fjallstavi við píki.
Bls. 27: Ein annar varð kroystur til deyðis yvir hupparnar, og tveir vóru bastir harumframt.
Bls. 31: Snæbjørn drepur fútan við píkstavi — ætlaði at drepa dómaran.
Bls. 39: Jákup bóndi við Neyst skjeyt tveir turkar og sló triðja deyðan við byrsuni.
Bls. 39: Turkar skóru bróstini av eini konu.
Bls. 42: Ein býttlingur fekk høgt høvur frá kroppi av turkunum.
Bls. 43: Ein maður vísu Marjunar var dripin av seyðatjóvi við knívi.
Bls. 47: Ottar prestur í Vági doyði, tá húskallurin slepti línuni, so Ottar fór beint í sjógvin.
Bls. 59: Kálvur Lítli letur Árna sita eftir í urðini undir Árnabergi, so hann mátti leggja beinini har.
Bls. 60: Kálvur skeyt bátin, har børn Árna sótu, frá landi, so báturin fór inn undir Árnaberg og sorlaðist í berginum.

| | |
|---|---|
| Bls. 60: | Arbeiðskonan fekk deyðamein av, at Kálvur trýsti brennandi heitan drýl at brósti hennara so fast, at tað stykki av bróstinum brendist, so hon fekk deyðamein. |
| Bls. 71: | Ungajógvanssynirnir Símun og Hanus drepa Høgna við at sláa hann í høvdið við eini ár. |
| Bls. 73: | Ungajógvanssynir steinaðu húskallin Kartnir deyðan. |
| Bls. 74: | Jógvan sló Tummas undir vangan við einum hólga so fast, at hann fell deyður niður. |
| Bls. 84: | Klæmintstovubóndin gekk Maltussonin út av Otthamri, so hann fekk deyðamein av lopinum. |
| Bls. 86: | Annika beindi fyri manni sínum og varð dømd lívleys. Hon varð niðursøkt á Havnarvág. |
| Bls. 102: | Óli Jarnheysur sleppir uppgávukonuni fyri borð. |
| Bls. 111: | Oyndri hevði stavin upp og rendi píkin í ennið á Gullbrandi, so hann doyði. |
| Bls. 115: | Yngri bróðirin koyrdi eldra út av einum brøttum heyggi, so hann fekk bana. |
| Bls. 116: | Páll Fangi verður sagdur at hava dripið pápa sín við at lata eitur út í drekka til hansara. |
| Bls. 131: | Arbeiðskona í Ónagerði hevði dripið eitt leysingabarn. |
| Bls. 133: | Guttormur í Múla avhøvdar ein útlendskan ránsmann við øks. |
| Bls. 136: | Guttormur í Gerðum hælaði niður á bróðurin, so hann var at sleppa bátinum og druknaði. |
| Bls. 137: | Guttormur í Gerðum og Múlabóndin koyrdu í felag Nóa út av eggini. |
| Bls. 138: | Guttormur í Gerðum gav Skarðsmonnum bjargalínu úr brendari høvdaull, ið slitnaði, og Skarðsmenn fullu í bjørgunum. |
| Bls. 140: | Húsarænararnir høvdu fyri sið at flyta menn og so seta teir út í útnes, so teir máttu fløða burtur ella doyggja í hungri. |
| Bls. 140: | Eina ferð drópu Húsarænararnir ein mann og høvdu hann til agns. |
| Bls. 141: | Húsarænararnir skóru bjargalínu við manni í av og sleptu línuni. |
| Bls. 141: | Húsarænararnir tóku klæðini av einum illa fyrikomnum manni og lótu hann sita eftir í bátinum. |
| Bls. 151: | Ein tjóvur varð hongdur. |
| Bls. 197: | Einkjan eftir Andrass, sum varð uppafturgift við Gutta, fekk deyðamein av, at Gutti rykti hart í belti hennara. |
| Bls. 197: | Gutti slepti línuni, so Andrass svøltaði í hel. |
| Bls. 207: | Erlendur á Steinum rakti Dalabóndan beint í nakkabeinið við neytabógnum, so hann small deyður niður. |
| Bls. 208: | Lorvíkspáll fýrir Erlend niður í eina urð, so hann doyði. |
| Bls. 213: | Skælingsbóndin og sonurin drepa Dalabóndan. |

Bls. 469: Snopprikkur beinir fyri frillu Giljabóndans.
Bls. 482: Líðar knúskaði Sevrin so mikið, at tað var honum til deyða.
Bls. 489: Hanus bóndi drap ein mann.

*Nolsøe* (1937):
Bls. 30: Ránsmaðurin fór illa við henni, tók gullbikarið aftur og skar bæði bróstini av henni.

*Úrslitið av kanningini. Drápstíðarfestingar, býtið av offrum og drápsmonnum, drápshættir, drápsgrundir og drápsstaður.*

Tíðarfestingarnar av teimum einstøku tilburðunum eru gjørdar eftir viðmerkingunum, ið teir einstøku útgevararnir av keld-

*1. talva.* Tíðarfesting av drápshendingunum.
(Yearly distribution of homicides in the Faroe Islands).

| Tíðarskeið (Period) | Tal av drápum (Homicides number) |
|---|---|
| Ár 825 til 980 | 0 |
| 980 — 1040 | 43 |
| 1040 — 1299 | 0 |
| 1300 — 1399 | 6 |
| 1400 — 1499 | 3 |
| 1500 — 1599 | 6 |
| 1600 — 1699 | 37 |
| 1700 — 1799 | 5 |
| 1800 — 1899 | 0 |
| 1900 — 1949 | 0 |
| 1950 — 1973 | 3 |
| Óvist (áðrenn 1800) (Doubtfull, before 1800) | 7 |
| Tilsamans (Total) | 110 |

unum hava gjørt. 1. talva sýnir tíðarfestingarnar av tilsamans 110 drápum, sum høvundarnir hava funnið í nevndu keldunum.

Í søguøldini frá o. u. 980 til o. u. 1040 verður sagt frá um 43 drápum í Føroyum. Fyrsta drápið verður umrøtt í Føroyingasøgu (F. S.) 15. bls.:

Havgrímur loypur upp á klettin móti Bresti og hirðir spjótið í miðjuna á honum og inn ígjøgnum. Tá ið Brestir kennir, at hetta er deyðastingurin, hevur hann seg fram á spjótið móti Havgrími og høggur til við svørðinum; eggin kom á vinstru øksl og kleyv alt niðureftir, gjøgnum øksl og síðu,

so armurin datt leysur niður, og fall tá Havgrímur deyður út fyri klettin og Brestir oman yvir hann; báðir lótu har lív. Nú søkja teir annan veg at Beini; hann vardi seg manniliga; men úrslitið var, at eisini hann læt lív. So er søgnin, at Brestir var tríggja manna bani, áðrenn hann drap Havgrím, og Beinir tveggja manna bani.

Flestu drápini frá søguøldini eru farin fram á líkan hátt, og orsøkin hevur oftast verið hevnd ella sjálvverja.

Í 17. øld eru aftur upplýsingar um nógv dráp. At kalla helmingurin av hesum drápum eru framd í samband við ránsferðir hjá útlendskum sjórænarum í oyggjunum.

Drápini frá okkara døgum eru bert tikin við í 1. talvu.

Av 2. talvu sæst, at flestu offur vóru føroyingar. Írar og turkar vóru sjórænarar á ránsferð, sum vóru dripnir av bygdafólkinum í verju. Norsku offrini koma fyri í F.S. Millum offrini vóru 85 menn, 12 kvinnur og 10 ótilskilað. 97 vóru vaksin, 3 børn og 7 ikki nærri tilskilað.

Av drápsmonnunum, ið nærri verða umrøddir, vóru 67 menn og tríggjar kvinnur. Ein av kvinnunum var Annika í Dímun, ið sambært Sagnir og Ævintýr (FFÆ) 86. bls. drap húsbónda sín. Tó tykjast ávís viðurskifti at benda ímóti, at søgnin um Anniku, ið sigur, at hon beindi fyri manni sínum og tók ein av húskøllum sínum til mann í staðin, bert er heilaspuni. Hin veruliga Annika tykist ikki at vera vorðin deyðadømd fyri dráp, men fyri blóðskemd (*Jakobsen* 1961, 485. bls. og *Andersen* 1895, 201. bls.). Ein onnur kvinna var Húsfrúgvin í Húsavík, ið eftir Færøsk Anthologi (F.A.) 375. bls., gróv tvær arbeiðskonur livandi í jørð. Triðja kvinnan var arbeiðskonan í Ónagerði, sum sambært FFÆ, 131. bls., drap eitt leysingabarn.

Flestu drápsmenninir vóru føroyingar, sí 2. talvu. Sonevndu turkarnir vóru allir sjórænarar. Talið á kendum drápsmonnum er minni enn talið á offrum, og er orsøkin til hetta, at sami maður ofta hevur dripið fleiri, serstakliga í søgualdarskeiðinum. Afturímóti finnast eisini dømi um einstøk dráp við fleiri drápsmonnum, til dømis Húsarænararnir, FFÆ 140—141. bls.

Tann einstaklingur, ið í Føroyum hevur dripið flestar menn,

*2. talva.* Offur og drápsmenn, býtt sundur eftir tjóðskapi.
(Nationality of the victims and the offenders of homicides in The Faroe Islands)

| Tjóðskapur (Nationality) | Offur (Victims) | Drápsmenn (Offenders) |
|---|---|---|
| Føroyingar (Faroese) | 86 | 65 |
| Norðmenn (Norwegian) | 8 | 0 |
| Írar (Irishmen)*) | 7 | 0 |
| Turkar (Turk)*) | 3 | 8 |
| Aðrir sjórænarar (other pirates) | 1 | 1 |
| Óvist (doubtful) | 2 | 2 |
| Tilsamans (total) | 107 | 76 |

* In ancient times in the Faroes pirates were called Irishmen or Turk.

er Sigmundur Brestisson. Hann kemur fyri sum drápsmaður hjá 10 monnum, sambært F.S. 40., 57., 58., og 60. bls. Í flestu førum vóru drápini hjá honum framd í sjálvverju. Nevnast skal tó, at Sigmundur eisini finst sum drápsmaður í fleiri tilburðum uttanlendis. Millum annað var hann herhøvdingur á einum strandhøggi í Svøríki, sambært F.S. 30. bls.:

> Teir sigla nú eystur undir Sviaríki. Sigmundur sigur tá við sínar menn: »Her gera vit innreið, og vit skulu fara hermansliga fram.« Teir fara nú á land og koma til bygdar við trý hundrað monnum, drepa fólk, taka fæ og brenna garðar. Bygdafólkið heldur undan, burtur í markir og skógir, tey, sum undan sluppu.

Sigmundur, sum verður mettur sum hetja av mongum í Føroyum, læt annars lív sum offur fyri einum ránsdrápi í Føroyum, F.S. 62. bls.

Tá ið nýttu drápshættirnir verða eftirkannaðir, finnast, sum væntandi er, dráp framd við svørði og øks serliga ofta umrødd í F.S. Eisini drukning finst ofta sum drápsháttur í F.S. Bert ein skottilburður er umrøddur, og er tað í FFÆ, har tað í søgnini um turkar í Suðuroy verður sagt frá, hvussu Jákup við Neyst drepur tríggjar sjórænarar í sjálvverju, 39. bls.:

> Jákup bóndi við Neyst var flýddur og hevði krógvað seg niðri í einum holi. Tríggir turkar runnu eftir honum, sóu hestin og kagaðu undir búkin

á honum inn í holið. Jákup lá og mundaði við byrsu sínari, til hann kundi skjóta tveir í senn. Tað lukkaðist, og hin triði flýddi. Men Jákup fekk hann aftur og sló hann deyðan við byrsuni.

Annars hava skotvápn ikki verið nýtt til dráp í Føroyum fyrr enn á okkara døgum.

Fjallstavur hevur verið drápsvápn fleiri ferðir, millum annað tríggjar ferðir í 17. øld. Ein av hesum tilburðum er Snæbjarnar dráp av fútanum í samband við eitt rættarmál, FFÆ 31. bls.:

Snæbjørn kallar hetta ein ómildan og órættan dóm, reiggjar stavin yvir høvdið á sær og ætlar at sláa dómaran kaldan; men dómarin bregður sær undan og niður í fangið á fútanum. Stavurin rakaði fútan í høvdið, so hann small deyður niður.

Fleiri dráp elvd av falli fara fram í bjørgunum við tað, at hann, ið situr við, sleppur línuni, til dømis FFÆ 47., 138. og 141. bls.

Ein tilburður við drápsháttinum brenning finst í FFÆ 60. bls., har sagt verður frá, hvussu tiltikni presturin Kálvur Lítli við vilja veldur eini arbeiðskonu eitt brunasár, sum verður hennara bani.

Einasta møguliga eiturdrápið er umrøtt í FFÆ 116. bls., har nevnt verður, at Páll Fangi segðist hava latið eitur út í drekka til pápa sín og dripið hann. Nógv kjak hevur verið um rættarmálið viðvíkjandi Páll Fanga, og ógreitt er, um hann var sekur (*Jakobsen* 1961, 492. bls., *Andersen* 1893 og *Nolsøe* 1955).

Lagt eigur at verða til merkis, at í ongum føri er kyrking umrødd sum drápsháttur í nýtta keldutilfarinum. Kyrking er annars ein hin vanligasti drápshátturin aðrastaðni. At eitur og skotvápn bert koma fyri hendingaferð er eisini sermerkt í mun til títtleikan av hesum drápsháttum yvirhøvur.

Roynt hevur verið at finna fram til tær mest sannlíku grundirnar til drápini í teimum ymisku tilburðunum, sí 3. talvu. Vanligasta drápsgrundin tykist at vera sjálvverja. Við grundini sjálvsríkan hevur Guttormur í Gerðum framt fleiri dráp, t. d. sambært FFÆ 136. bls.:

Sum teir komu aftur og vóru ábeint Haraldsund, kom ein meldurglaða og hvølvdi bátin. Guttormur komst á kjøl, og eldri bróðirin fekk tríggjar

*3. talva.* Tær ymisku drápsgrundirnar.
(Motives of homicides in the Faroe Islands).

| Drápsgrund (Motive) | Tal (Number) |
|---|---|
| Illsinni, klandur og tílíkt (Anger, insult etc.) | 22 |
| Hevnd (revenge) | 19 |
| Sjálvverja (self-defence) | 30 |
| Ránsdráp, sjálvríkan (robbery) | 19 |
| Politisk dráp (political homicide) | 2 |
| Kynsligt dráp (sexual homicide) | 4 |
| Øvundsjúka (jealousy) | 1 |
| Óvist (doubtful) | 10 |

ferðir hendurnar fastar, men Guttormur hælaði niður á hann, so hann varð at sleppa og druknaði. Á henda hátt fekk Guttormur garðin.

Annað drápið við møguligari kynsligari grund finst lýst í FFÆ 39. bls. í samband við framferð sjórænaranna í Suðuroy:

Tey vóru stutt sloppin, so komu tríggir turkar aftaná. Konan var illa ment at ganga; teir gingu hana upp, lupu á hana, og ikki tordi maðurin at koma henni til hjálpar. Hon fekk tveir undir seg; tá kom hin triði og vann hana. So koyrdu teir hana út av eiðisbakkanum. Hon datt niður á eina hellu, men doyði ikki. So grumlaði hon til ein hyl at fáa sær vatn at drekka; hetta sóu ránsmenninir, fóru niður ein annan veg og skóru bróstini av henni.

Tilburður av sama slag finst umrøddur í Varðanum (*Nolsøe* 1937).

Ein hin óhugnaligasta og ótespiligasta drápshendingin verður lýst í FFÆ 140. bls. um Húsarænararnar, ið drópu ein mann og høvdu hann til agns.

Millum politisku drápini er drápið av norska skattakrevjaranum Karli Mørska í 1028 roknað uppí, F.S. 77. og 99. bls.

Suðuroyggin er, sum tað sæst av 4. talvu, oyggin, har flest dráp eru framd. Orsøkin til hetta er fyri ein part tann, at herjan sjórænara í oynni førdi við sær 16 dráp, har 10 offur vóru sjórænarar og seks vóru føroyingar. Tey átjan drápini í Skúvoy, Stóru Dímun og Lítlu Dímun eru øll lýst í F.S., t. e. vórðu framd í søguøldini.

Nakrar av drápshendingunum, ið lýstar eru í søgnunum, eru ikki tiknar við í talvunum. Orsøkirnar til hetta eru annað-

*4. talva.* Tey ymisku drápini, býtt eftir drápsstaði.
(The places of homicides in The Faroe Islands).

| Drápsstaður (Place of homicide) | Tal (Number) |
|---|---|
| Norðuroyggjar | 8 |
| Eysturoy | 5 |
| Streymoy | 21 |
| Nólsoy | 1 |
| Hestur | 1 |
| Mykines | 2 |
| Vágar | 2 |
| Sandoy | 15 |
| Skúvoy | 4 |
| Stóra Dímun | 3 |
| Lítla Dímun | 11 |
| Suðuroy | 26 |
| Á havinum (at sea) | 7 |
| Óvist (doubtful) | 1 |

hvørt, at sagnirnar hava verið ov lítið veruleikakendar, t. d. FFÆ 158.—159. bls., ella har talið á dripnum ikki fæst skil á. Dømi um slíkar hendingar er, tá ið Snopprikkur boraði hol á bátin hjá hovbingum og klíndi mold í holini, so báturin sakk við øllum monnunum í, sí FFÆ 14. bls. Eitt annað dømi er søgnin um, hvussu Guttormur í Gerðum gjørdi av við skarðsmenn, FFÆ 138. bls.:

Skarðsmenn skuldu søkja lunda, men áttu ongan reiðskap og sendu tí boð til Guttorms. Hann sendi teimum bjargalínur gjørdar burtur úr brendari høvdaull. Sum vera mundi, slitnaðu tær, og Skarðsmenn fullu í bjørgunum. Á henda hátt ognaðist Guttormur fjórðingin av Skarðsbygd.

Eftir seinna heimsbardaga hava verið tveir drápstilburðir í Føroyum. Onnur hendingin fór fram í 1967 og snúði seg um eina 22 ára gamla norska kvinnu, búsitandi í Havn, sum varð dripin við skoti av fyrrverandi dreingi sínum, einum 23 ára gomlum ógiftum føroyingi. Drápsgrundin tykist at hava verið øvundsjúka av at hava verið narraður. Maðurin skeyt seg sjálvan eftir drápið og læt eftir seg skilnaðarbræv. Eingin av pørtunum tykist at hava kent til (av rúsdrekka).

Hin hendingin snúði seg um ein ikki áður revsaðan 24 ára gamlan ógiftan føroying, sum við grindaknívi stakk tvær ungar gentur og ein 30 ára gamlan mann, sum kom gentunum til hjálpar. Drápsmaðurin kendi nógv til. Onnur gentan og maðurin doyðu. Drápsmaðurin varð sálarliga kannaður, og var millum annað upplýst, at gerðin var framd í órættvorðnum tilviti, og hon var nevnd ótilætlað og skaplyndisfremmand. Hann varð dømdur til varðhald á sjúkrahúsi fyri sinnisbrekað fyri dráp og drápsroynd sambært revsilógarinnar §§ 16 & 18.

Nevnt eigur at verða, at hóast eingi onnur dráp eru kend frá nýggjari tíð í Føroyum, so hava føroyingar verið við uppi í drápshendingum í árunum eftir seinna heimsbardaga bæði í Danmark, Grønlandi og Íslandi (*Hansen* 1972, *Hansen* og *Bjarnarson*).

Sum nakað serstakt kunnu verða nevnd dráp orsakað av herstríði. Bardagin í Mannafelsdali er lýstur í F.A., 380. bls. og sigst har hava verið stórt mannfall. Undir seinna heimsbardaga doyðu tilsamans 163 fólk í Føroyum ella á føroyskum skipum av krígsávum, sambært rit hjá donsku heilsustjórnini (*Sundhedsstyrelsen* 1949). Av hesum doyðu seks á landi orsakað av minubrestum, og 157 vóru sjómenn ella fiskimenn.

Avrættingar eru eisini eitt slag av drápi, og dømi um slíkar í Føroyum eru umrødd á 23. bls. hjá *Zachariasen* (1959). *Andersen* (1895) greiðir á 230. bls. frá danska admirálinum Jørgen Daa, ið læt átta útlendskar sjórænarar heingja í Vestmanna 1615. Eisini verður sagt frá einstøkum avrættingum í FFÆ, 86. og 151. bls., og í F.A., 368. og 373 bls.

## ÚRTAK

Gjørt er eitt savnað yvirlit yvir dráp í Føroyum frá landnámstíðini til okkara dagar. Keldutilfarið er fyrst og fremst Føroyingasøga og føroyskar sagnir. Kanningin sýnir, at flestu drápini, ið upplýsingar finnast um, eru framd í søgutíðini og 17. øld, sí 1. talvu. 2. talva sýnir, at fleiri av offrunum og drápsmonnunum vóru útlendingar. Títtleikin av ymiskum drápshættum í tilfarinum verður lýstur. Drápsgrundirnar eru lýstar í 3. talvu, ið sýnir, at vanligasta grundin var sjálvverja. Býtið av drápum eftir

drápsstaði finst í 4. talvu, har tað sæst, at Suðuroyggin er oyggin, har flest dráp eru framd. Orsøkin til hetta er, at stívur helmingurin av drápunum í Suðuroy stavar frá herjan sjórænara í oynni í 17. øld.

Tjakast verður um, hvussu álítandi keldutilfarið er. Nevnd verða dømi, ið sýna, at ávísar sagnir ikki eru eftirfarandi, antin tí, at tær siga frá ov nógvum drápum, ella tí at ov fá dráp verða umrødd.

## SUMMARY

A survey has been carried out of homicides committed in the Faroes, from the time of the first occupation of the islands until the present day. *Føroyingasøga* and the Faroese records are the primary sources. Research has shown that the majority of homicides about which any information can be traced were committed in the time covered by the saga and in the seventeenth century (see Table I). Table II shows that several of the offenders, and of the victims, were foreigners. The frequency with which various methods of killing appear in the sources is given. The motives of homicides are to be found in Table III, which shows that the most usual motive was self-defence. The places of homicides are given in Table IV, where it will be seen that the island where most homicides occurred was Suðuroy. The reason for this is that well over half the homicides committed in Suðuroy happened with the plundering of the island by pirates in the seventeenth century.

There is some dispute as to whether the sources may be relied on. Instances quoted show that certain records are not reliable, since either too many homicides, or too few, are mentioned in them.

## BÓKMENTIR

1. *Andersen, N.:* »Museum« II. København 1893.
2. *Andersen, N.:* Færøerne 1600—1709. København 1895.
3. *Føroyingasøga.* Skúlabókagrunnurin. Tórshavn 1962.
4. *Hammershaimb, V. U.:* Færøiske folkesagn. Antiquarisk Tidsskrift, København 1852, bls. 337.
5. *Hammershaimb, V. U.:* Færøsk Anthologi. København 1891.
6. *Hansen, J. P. H.:* Drab i Grønland. Tidsskriftet Grønland 1972.
7. *Hansen, J. P. H. & Bjarnarsson, Ó.:* Drab i Island. Ikki prentað.
8. *Hentze, J. M.:* Sagnir úr Sandoy. Varðin 6:203, 1926.
9. *Jakobsen, J.:* Færøske Folkesagn og Æventyr I—III. 2. útg. Tórshavn 1961.
10. *Krigsdødsfald i Danmark under den anden verdenskrig* 1939—1945. Sundhedsstyrelsen, København 1949.

11. *Medicinalberetninger* 1877—1970. Sundhedsstyrelsen. København.
12. *Nolsøe, P.:* Ránsmenn í Nólsoy. Varðin 17:29, 1937.
13. *Nolsøe, P. J.:* Tingskjøl viðvíkjandi Páll Fanga. Varðin 31:129, 1955.
14. *Svabo, J. Chr.:* Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782. København 1959.
15. *Zachariasen, L.:* Føroyar sum rættarsamfelag 1535—1655. Føroya Fróðskaparfelag. Tórshavn 1959.